

## Togo ikki við

Hóast kappingin um at gerast afrikanskur meistari í fótbólti byrjar í dag, er longu greitt, at Togo ikki fer at vinna heiðurin. Landið hevur tikið seg úr African Nations Cup, eftir at uppreistrarmenn úr Angola fríggjadagin skutu við maskinbyrsum eftir spælarabussinum hjá Togo. Bussførarin, ein hjálparvenjari og eitt samskiftisfólk doyðu av skotunum og tveir leikarar vóru særdir. – Fleiri av leikararunum vilja bara sleppa til hús. Teir hava sæð deyðan í eyguni og vilja ikki luttaka í kappingini. Eingin av okkum fær sovið eftir hendingina. Um trygdin ikki er nøktandi, noyðast vit at fara heim. Vit vilja ikki seta lívið í váða, sigur Emmauel Adebayor við Sky Sports. Togo skuldi eftir ætlan spæla ímóti Ghana í dag.



### Neistin-H71 33-27 (15-13):

# Unglingin og veteranurin á muni

**Ein óræddur málverji við ungdómsins dirvi og ein garva rotta við øllum sínum snildum. Tað var uppskriftin hjá Neistanum, tá teir enn eina ferð styrktu um oddastøðu sína**




Jákup Mørk

Finaluplássið hjá Neistanum er nú bara at rokna sum ein formalitetur. Sunnudagurin var í øllum førum enn ein av teimum, har munurin niður til næsta liðið øktist við tveimum stigum, og tí er ilt at síggja Neistan sum nakað annað enn vinnara av kappingini um pláss í sjálvari FM-finaluni.

### Unglingin og veteranurin

Nógv hevur verið skrivað og tosað um allar profilarnar, sum Neistin hevur á liðnum. Við monnum sum Finnuri Hansson, Heina Hanusarson, Jugoslav Djumic, David Edvardsen og Tróndi Kragesteen hevur liðið fleiri spælarar av slagnum, sum avgera hondbóltsdystir, men tað var nú ikki nakar av teimum nevndu, sum avgjørdu dystin sunnudagin.

Gaman í skeyt Finnur 11 mál, men hann mundi skjóta á leið tríggjar ferðir so ofta. Og heldur ikki hjá hinum monnunum lá veruliga fyri at avgera dystin. Fyrst og fremst tí Levi Nybo stóð ein branddyst í H71-málinum.

Tað gjørdi Ári Dam hinvegin eisini í Neista-málinum. Hann var akkurát munurin, tá Neistin fyrstu løtuna av dystinum tók seg nøkur mál framum. Og tá liðfelagarnir ikki megnaðu at skora móti Levi, framdi Ári bara tilsvarandi nógvar bjargingar upp á 100%-møguleikar hjá hoyvíkingum. Teirra millum íroknað tvey brotskøst, sum vórðu misnýtt, tá bara trý mál vóru á muni.

Stórspælið hjá Ára átti av røttum at punktera dystin, men hetta hendi ikki, fyrr enn Ingi Olsen skifti seg sjálvan á vøllin. Hann skoraði sjálvur einaferð. Fekk framprovokera eina útvísing og eitt brotskast, og so hevði hann annars nakrar fínar fríspælingar. Og hetta var nóg mikið hjá Neistianum, sum seinastu løtuna veruliga leyp avstað.

Tá var tíðin hjá H71 at vinna seg aftur eisini alt ov lítil, og so máttu teir ásanna, at tað heldur ikki varð hesaferð, at teir skuldu basa Neistanum.

### Fakta um dystin

**Neistin-H71 33-27 (15-13)**
**10 min:** 5-3
**20 min:** 11-8
**40 min:** 18-16
**50 min:** 24-20
**Málskjúttar**
**Neistin:** Finnur Hansson 11(4), David Edvardsen 7(3), Jugoslav Djumic 5, Sjúrður Thomassen 4, Tróndur Kragesteen 3, Ingi Olsen 2, Heini Hanusarson 1
**H71:** Dánjal Tórgarð 11(5), Janus Sørensen 4, Esbern Patursson 4, Tróndur Vatnhamar 3, Freddie Poulsen 2, Poul Kjartan Dam 2, Rógvi Sørensen 1
**Brotskøst:** Neistin 8, H71 7
**Útvísingar:** Neistin 4, H71 5
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Heri Petersen